Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Heath Ledger vann eina Golden Globe

Tað var einki yvirraskilsi, tá ið Heath Ledger, sum doyði fyri umleið einum ári síðan, vann eina Golden Globe fyri sín leiklut í filminum Batman – 'The Dark Knight'.
Tá ið tað varð almannakunngjørt, at Heath Ledger var tilnevndur til prísin, segði fyrrverandi kona hansara, Michelle Williams, at hon fegin vildi taka ímóti prísinum fyri hann. Hetta vildi hon gera vegna Matilda Rose, dóttir teirra, men familjan hjá Ledger var ímóti hesum.
Spenningurin um, hvør skuldi taka ímóti prísinum, ið varð latin av Demi Moore øktist, tá ið leikstjórin, Christopher Nolan, kom á pallin.
– Øll vit, ið hava arbeitt við Heath, taka ímóti hesum, við einari ræðuligari kenslu av sorg og stoltleika, segði Nolan.
Harvið er tað enn einaferð greitt, at australski sjónleikarin fer at lata eitt tómrúm vera eftir sær í filmsøguni.

(Skrivað hevur Annika Lamhauge-Mortensen, starvspraktikantur hjá Sosialinum)



## Frændur: Fløgan kemur í heyst

Eftir eitt inspirerandi vikuskifti er Steintór Rasmussen nú til reiðar at avdúka, at Frændur geva enn eina fløgu út, nú 25 ára eru liðin síðan fyrsta plátan kom á gøtuna.
Í samrøðu við Rás2 sigur Stentór, at vikuskiftið var nýtt til at savna tilfar, sum teir ymsu limirnir í Frændum høvdu liggjandi, og nú er greitt at tilfar er til taks, og hetta skal verða árið har Frændur menninir gera ætlanir til veruleika. Sambært Steintóri hevur prátið seinastu árini snúð seg nógv um at útgeva eina fløgu, og hetta árið er eitt gott ár at gera dreymar til veruleika.
Spurdur um hvørt tilfarið hjá Frændum á nýggju fløguni fer at verða í sama stíli sum undanfarnu fløgur, sigur Steintór, at Frændur hevur verið væl móttikið, og at hann sær onga orsøk til at Frændur skal broyta stíl nú. Tað sum Steintór tó sær sum ein vansa, er at Frændur hevur verið sera væl umtókt allar sínar dagar, og tað hevur sambært honum verið spell, um 25 ára útgávan, ikki var eins væl móttikin og hinar. Hann leggur tó smílandi aftrat at "Hví skuldi hon ikki tað". Tað er so ein spurningur, sum vit fáa svar uppá, tá nýggja Frændur fløga kemur á gøtuna seinni í ár.

# Bjørk Olsen: Mús strævið og lærurikt

**Nógv vóru tey, ið vónrík leitaðu sær til upptøkuroynd sum vertir til Mús. Tann hepni vinnarin gjørdist 17 ára gamla Bjørk Olsen**



30 vóru tey, ið vóru til upptøkuroynd hjá Klippfisk við vónum um at gerast nýggi vertur til Mús. Bjørk Olsen gjørdist tó hepni vinnari av kappingini, og hetta hevur sambært Bjørk verið ein sera strævin og ikki minst lærurík tíð.
– Eg fór beint úr skúla til eina hárfríðkanarstovu og síðani at filma. Vit arbeiddu til langt út á náttina, og tíðin at fyrireika okkum var sera knøpp, so mangan var tað strævið at fáa alt at hanga saman, sigur Bjørk Olsen.
– Tá tíðin er knøpp, lærur ein t.d. at samskifta við fólk á ein heilt øðrvísi hátt. T.d. tá ymsir serfrøðingar komu inn í upptøkuhølið, vóru vit noydd at læra at fáa tey at føla seg gott beinanvegin, tí tíðin var ikki til at hava langar samrøður við tey áðrenn upptøkurnar, sigur Bjørk

### "Do You Want Me To Seduce You"

Ungdómsheimasíðan www.nym.fo hevur mangan hildið eitt vakið eyga við almennum persónum í Føroyum, og tí kom tað ikki heilt óvæntað, tá eitt videobrot lá á heimasíðuni, ið vísti ein heldur øðrvísi vinkul upp á ungu vertinnuna. Í bakgrundini koyra orðini "I'm not going to seduce you. Do you want me to seduce you?" , og mong eru tey, ið hava lagt ungu havnagentuna undir at sokallað "flirtra " við teir ymsu gestirnir í Mús sendingunum. Til hesa ákæruna sigur unga kvinnan soleiðis:
– Vit hildu tað verða ótrúliga skeg, og vístu brotið í eftirfylgjandi Mús sending. Eg haldi, at orsøkin til at eg bleiv løgd undir at "flirtra", var tí at eg var so móð aftaná teir longu arbeiðsdagarnar og var tískil ikki heilt tilvitað um hvørji signal eg sendi út , sigur Bjørk.

### Mús aftur á skíggjan?

Slatur hevur gingið um, at Mús aftur skal á skíggjan til eina sokallaðu "rundu 2", og hetta avnoktar Bjørk Olsen ikki.
– Vit hava fingið fyrispurning frá Kringvarpinum, um at halda fram við sendingunum, men enn er tað bert prát, sigur Bjørk Olsen. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á Programleiðaranum hjá Kringvarpinum, men meira verður at frætta um hetta skjótast gjørligt.

**Bjørk Olsen heldur møguliga fram í nýggjari »rundu« av Mús**